VINNUHÚSIÐ
House of Industry



Húsini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag R. C. Effersøesgøta 30 í Tórshavn verða lýst til sølu.

Húsini eru bygd í 1968 og eru uml. 290 $m^2$ i trimum hæddum kjallara, miðhædd og loft. Í húsinum eru 7 skrivstovur og 2 fundarhøli. Teldunet er innlagt í húsið. Húsini liggja mitt í býnum. Parkeringsøki, sum rúmar 8-10 bilum er aftanfyri húsini. Húsini er vælegnaði til skrivstovuhølir, men niðasta hæddin kann eisini brúkast sum handilshølir.

Áhugað, sum ynskja at síggja húsini, kunnu venda sær til umsitingina í Vinnuhúsinum.

Møgulig boð upp á húsini skulu latast skrivliga til Vinnuhúsið, umvegis fax ella teldupost á industry@industry.fo

Myndir av húsinum innan og uttan eru at síggja á heimasíðu okkara www.industry.fo

Vinnuhúsið · Boks 1038 · R. C. Effersøesgøta 30 · FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 31 18 64 · Fax +298 31 72 78 · E-mail: industry@industry.fo



# Vælkomin til møti í Samljóð



Stórmøtir verða
í Samljóð í Skopun
við prædikumanninum
Viggo Vilhelmsen
úr Noregi



Jens og Kristel Lisberg
luttaka við sangi

Møtini verða:

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadagin | 13. februar | kl. 20.00 |
| Leygardagin | 14. februar | kl. 20.00 |
| Sunnudagin | 15. februar | kl. 11.00 og 19.00 |

Øll eru hjartaliga vælkomin.
Eisini verður drekkamunnur aftaná kvøldmøtini

Sosialurin 341800



TIL SØLU

Seat Leon mai 2002 til sølu um hóskandi boð fast. 17" felgur og 16" við vetrardekkum. Koyrt 27.000 km 180 HK Ring 533053 ella 333435 eftir arbeiðstíð





Hagstova Føroya

er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins.

Stovnurin er í trimum deildum - Hagdeild, KTdeild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber.

Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT tøkningar og skrivstovufólk.

*Starv á Hagstovuni*

*Hagstovan hevur tørv á fólki til fólkahagtøl, serliga íbúgvahagtøl, arbeiðsmarknaðarhagtøl og inntøkuhagtøl.*

*Til at hava hesa uppgávu um hendi, sóknast vit eftir einum væl útbúnum fólk. Verkætlanirnar í hesum sambandi fara fram í tøttum samstarvi við KT tøkningar og tí vera eisini krøv sett um góð samstarvsevni og góð samskiftisevni um dataskipanir.*

*Besti førleikin er akademisk samfelagsfrøðilig útbúgving, men hevur tú aðra hægri útbúgving og haraftrat royndir ella serligan áhuga í samfelagsmálum, kann hetta vera nøktandi førleiki til starvið. Royndir av arbeiði við telduforritum og datagrunnum geva fyrimun.*

*Starvið verður lønt eftir galdandi sáttmála millum Landsstýrið og avvarandi fakfelag.*
*Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1.mars 2004.*

*Set teg í samband við Axel Nolsøe, deildarleiðara, ella Hermann Oskarsson, stjóra, á Hagstovu Føroya, telefon 352800, vilt tú hava meira at vita um starvið.*











*Fyrsti arbeiðsdagur í Tinganesi. – Tann góði bátsfomaðurin ráðleggur við bátsmanningina, áðrenn hann leggur á fjørðin. Vil hann sær og síni manning væl, so boðar hann eisini hinum bátinum frá, hvussu hann ætlar at sigla og lurtar væl og virðiliga eftir báðum manningum, áðrenn hann setir seg aftur í rong at stýra. Tað er neyðugt, tí á ferðini, sum vit nú byrja, skal siglast í øllum veðri, segði Jóannes Eidesgaard m. a., tá hann varð valdur til løgmann týsdagin 3. februar 2004*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# »Politikkur merkir, at vit seta okkum mál fyri samfelagsgongdina«

**Niðanfyri prenta vit røðuna, sum Jóannes Eidesgaard helt í løgtinginum, tá hann varð valdur til løgmann 3. februar**

*Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

Eg takki hjartaliga fyri tann stóra heiður og tað stóra álit, sum mær er vístur í dag, nú løgtingið hevur valt meg til Føroya løgmann.

Olof Palme, sáli segði nógv gott og hugvekjandi um politikk. Umframt at siga kendu orðini, at politikkur var at vilja, so segði hann eisini: "Politikkur merkir, at vit finna saman til tess at loysa felags uppgávur. Politikkur merkir, at vit seta okkum mál fyri samfelagsgongdina. Hesi mál skulu fevna um eitt gott samfelag, sum vit skulu byggja í felag" .

Hesi orð Palmes runnu mær í huga, nú tað eydnaðist Sambandsflokkinum, Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum at finna eina breiða semju um eitt gott og mennandi samgongugrundarlag.

Orðini hjá Palme eru í grundini sera einføld orð. Ikki serstakliga høgtflúgvandi, men tey eru so sonn, sum tey eru søgd, og tey lýsa sera rámandi støðuna í okkara samfelag.

Vit standa við eitt vegamót í føroyskum politikki og í føroyskari samfelagsmenning, har tað er avgerandi neyðugt, at vit í breiðari semju seta okkum nøkur nýggj mál, sum skulu leiða til eitt uppaftur betri samfelag.

Henda støða krevur, at vit á breiðum støði finna eina semju um, hvar vit standa í løtuni, hvørjir teir stóru spurningarnir eru, og hvussu vit herfrá koma víðari til tað góða samfelagið, sum vit øll innast inni ynskja fyri okkum sjálvi og fyri okkara eftirkomarar.

Vit hava í okkara samgonguskjali roynt at lýsa og greina teir týdningarmestu spurningarnar, vit hava roynt at eyðmerkt trupulleikarnar, og vit eru samd um, hvussu vit loysa teir. Tað verður eingin lættur róður, men vit skulu so rógva hann, og vón mín er, at áralagið verður gott, og at semjan innanborðað verður góð.

Vit hava, hvør flokkur út frá sínum hugsjónarliga støði, sett okkum nøkur mál. Vit hava í samgonguskjalinum greitt frá, hvussu vit ætla at sameina hesi mál, og hvussu vit ætla at røkka hesum málum. Nøkur av hesum málum snúgva seg um ein betri gerandisdag fyri øll í Føroyum - onnur snúgva seg um eina breiða tjóðskaparliga semju um sjálvstýrisspurningin og viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Uppaftur onnur mál fevna um búskap, vinnulív, útbúgving og mentan, ábyrgd fyri umhvørvi og einum umheimi, har neyðin nógvastaðni er gerandiskostur.

Tað sigst, at Palme royndi at finna tann gylta millumvegin millum utopiina og gerandisdagin. Hetta man vera galdandi fyri okkum øll - vit mugu seta okkum høg og bjørt mál, men vit eiga samstundis at ansa eftir, at vit við okkara politiska virksemi ongantíð gloyma, at gerandisdagurin hjá fólki er tað týdningarmesta í politikki.

Allir partar hava í samgongusamráðingunum sýnt ein sterkan vilja til at finna saman um at loysa nakrar felags uppgávur og felags mál, sum eru av alstórum týdningi fyri tjóðina. Í hesum sambandi vil eg takka øllum teimum, sum beinleiðis luttóku í sjálvum samráðingunum og teimum, sum vóru rundanum.

Eg loyvi mær at halda, at loysnirnar eru bæði haldgóðar og skilagóðar. Hesar loysnir eru sjálvsagt merktar av, at teir tríggir samgongufIokkarnir standa hugmyndaliga langt frá hvørjum øðrum, eins og teira hava ymiskar áskoðanir á búskaparligu skipanina. Hetta nýtist ikki at gerast ein forðing - tvørturímóti. Men henda støðu setir krøv til sínamillum virðing og krevur ein støðugan semjusøkjandi politikk. Samráðingarnar hava víst, at flokkarnir megna hetta, og eru tí allar grundir til at hava bjartar vónir um hesa samgongu, sum vónandi kann borga fyri stabiliteti, arbeiðssemi og arbeiðsfriði.

Gaman í, eru hetta tríggir ymiskir flokkar, sum á fyrsta sinni skipa samgongu, men eg síggi ljóst upp á tað, sum bíðar okkum. Fyri at brúka eina mynd, sum trælborni Booker T Washington, ið stríddist fyri útbúgving til tey littu í USA fyrst í seinastu øld, brúkti: "Vit kunnu vera so eyðsýnliga atskildir sum fingrarnir, men ein sum hondin í øllum lutum, sum eru alneyðugir fyri felags framstig".

Nú leggja vit so til brots við lutvíst nýggjari manning og lutvíst nýggjum hugsjónarligum førningi umborð. Hetta merkir ikki, at øll mál og mið hjá undanfarnu bátsmanning eru blakað fyri borð. Nógv gott varð sett í verk av undanfarnu samgongu, og vit fara sjálvsagt at varðveita nógvar av teimum lunnum, sum tá vórðu lagdir. Eg vil í hesum sambandi bjóða andstøðuni við til at loysa teir stóru samfelagsspurningarnar, sum skulu loysast í hesum valskeiði.

Tann góði bátsfomaðurin ráðleggur við bátsmanningina, áðrenn hann leggur á fjørðin. Vil hann sær og síni manning væl, so boðar hann eisini hinum bátinum frá, hvussu hann ætlar at sigla og lurtar væl og virðiliga eftir báðum manningum, áðrenn hann setir seg aftur í rong at stýra. Tað er neyðugt, tí á ferðini, sum vit nú byrja, skal siglast í øllum veðri.

Takk fyri og Harrans signing yvir land og fólk!